# TILTØK

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Heimasíða okkara: www.koma.fo

**»Tíð til Gud«**
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Drekkamuður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Teir stríðandi partarnir. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin kl. 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti har Poul Jóhan Djurhuus, Jógvan Páll Sevdal og Páll á Lakjuni tala, kl. 21 Útimøti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Malan, Heri og børnini vera við, kl. 18 YM-møti v/ Hera Kjærbo, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Rhema á Hálsi**
Bønarmøti verður mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
**Fundarøðin við Jens Garnfeldt:** Fríggjakvøldið kl. 20 Møti.
Leygarmorgunin kl. 10-12 Opið leiðaraseminar (øll við eini ella aðrari ábyrgd í samkomuni kunnu møta). Kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti. Sunnudagsskúlin er kl. 11. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti, har Jónfinn Olsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld einki Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 við talu og sangi av Streingjakórinum av Toftum.
Leygarkvøldið er møti kl. 20 við talu og sangi av Meinigheitskórinum í Havn.
Innsavnan. Bønarløta er 1/2 tíma undan møtunum.

**Mizpa, Eiði**
Møtirøð verður í Mizpa í vikuskiftinum. Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Talarar: Høgni Johannesen og Janus Gunnarsson. Eisini verður sangluttøka við: Allan Ellingsgaard, Kristjan og Kára. Øll eru vælkomin.

**Avhaldshúsið í Vík**
Evangeliskt møti verður í Avhaldshúsinum í Vík leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19. Herman og Gigga syngja.

**Keldan, Skálafirði**
Ungdsómsráðstevna í bygdarhúsinum á Strondum. Hesi tiltøk eru almenn:
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/ Jan Honningdal og Magnus Persson. Kl. 22.30 Praise explosion við Liquid Gravity og Eyðun Jacobsen.
Leygarkvøldið kl. 19 Møti v/ Magnus Persson o.fl. Kl. 22.30 Praise explosion v/ Jan Honningdal o.fl.
Sunnudagin møti í Kelduni kl. 17 v/ Paula Høj og Jan Honningdal.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Barnamøti verður í dag kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Kitty Johannesen og Juliannu Bech v.fl.
Mánadagin kl. 17 møta Liljurnar. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Jóhann Petur Jóhannesen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Norðoyggjar**
Vikuskiftismøti í missiónshúsinum á Viðareiði.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 talar Absalon Matras, Óli Poulsen syngur.
Leygarkvøldið kl. 19.30 talar Pól Johannesen, BIS.CO syngur.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Regin Høgnesen.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Ragnar og Jeannu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 verður filmurin »Korset og springkniven« vístur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagin kl. 15.30 verður barnahugni.
Tórsdagin kl. 19.15 venur Dansibólkurin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Framtíðin í Vági**
Leygarkvøldið kl. 21 Møti, ung og tilkomin luttaka við lovsangi, solosangi, drama og vitnisburði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Møtiskrá hjá Hera Elttør trúboðara í DK**
Fríggjakvøldið 18. og leygarkvøldið 19. jan kl. 19.30 missiónsvika á Sjómansheiminum í Hvide Sande.
Sunnudagin 20. januar kl. 17 Møti í Sønderborg (Missónshúsinum Møllegade 9).
Mánadagin 21. Missiónsvika í Kloster v/ Ringkøbing kl. 19.30.
Mikudagin 23. kl. 19.30 Missiónsvika í Brande.
Hósdagin kl. 19.30 Møti í Ans missiónshúsi.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 14. januar*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Ítriv (Framtíðarætlanir)
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
*Týsdagin 15. januar*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát o.a.
*Mikudagin 16. januar*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 17. januar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 18. januar*
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 20. januar verður lættur gongutúrur: Reynsmúlalág, Velbastaðgøtan og fram við nýggja vegin til Gomlurætt. Farið verður av Krossinum (v. Velbastaðvegin) kl. 11. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið,*
*Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10*
*tlf./fax 321520*
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið í Århus**
*Vestergade 48D*
*8000 Århus C*
*Tel. 86 18 06 04*
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.



## FILMSTEIGURIN

# Moulin Rouge

Filmurin snýr seg um tann eyðkenda og glamourøsa parisaranáttklubban fyri umleið 100 árum síðani, og hann hálovar sannleikan, vakurleikan men fram um alt kærleikan.

Nicole Kidman spælir Satine, stjørna í Moulin Rouge og býarins kendasta kurtisana, sum er fangað millum kærleika sín og tað, at ein annar maður er púra burtur í henni.

Ewan McGregor spælir rithøvundurin, Christian, sum verður kastaður út í ein dekadentan heim, har alt er loyvt – burtursæð frá at forelska seg.

Talan er um eina einfalda kærleikssøgu, sum er fortald við hjálp av nýggjum og gomlu songum í einum høgt gearaðum filmsmáli, sum ger sær dælt av allari teirri nýggjasta digitaltøkni.




# The Ring

Tvær tannáringagentur eru einsamallar heima eitt kvøldið og forskrekkja hvørja aðra við at fortelja spøkilsissøgur. Onnur av gentunum. Tomoko, hevur sæð ein serligan videofilm, og sum hon sigur: »Um tú sært bandið, ert tú noydd at vísa einum øðrum bandið, áðrenn ein vika er farin. Annars doyrt tú!«. Lítla løtu seinni verður hon rakt av einum forbannilsi.

Fastir Tomoko, Reiko, er sjónvarpstíðindakvinna og finnur út av, at tríggir aðrir vinir hjá Tomoko eisini brádliga eru deyðir eitt vikuskifti í eini summarsmáttu. Reiko fer út til smáttuna og finnir eitt ómerkt videoband. Við hjálp frá fyrrverandi manni sínum, Ryuji, sum er matematikkprofessari, fær hon staðfest á dialektini hjá eini gamlari konu, at hon er av oynni Oshima. Har hoyra tey um eina gentu, nevnd Sadako, døttir eina innfødda kvinnu, sum er kend fyri okkulta megi, sum fyri mongum árum síðani var brúkt til parapsykologiskar kanningar…








**Frumsýning**
Fríggjadagin 18.01. kl. $23^{00}$ Leygardagin 19.01. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 20.01. kl. $19^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆




**Frumsýning**
Fríggjadagin 18.01. kl. $23^{30}$ Leygardagin 19.01. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 20.01. kl. $23^{00}$




**Billettprísur: 70.- kr.**
Fríggjadagin 18.01. kl. $19^{15}$ Leygardagin 19.01. kl. $19^{15}$
Sunnudagin 20.01. kl. $21^{30}$




Fríggjadagin 18.01. kl. $21^{15}$ Leygardagin 19.01. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 20.01. kl. $20^{45}$




Fríggjadagin 18.01. kl. $19^{00}$ Leygardagin 19.01. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 20.01. kl. $18^{30}$